# Lívs- og Bráðsjúkutrygging

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| ☐ | **Pakki 1** | Kr. 251,52 pr. mðn. | Lívstrygging<br>Bráðsjúkutrygging<br>Bráðsjúkutrygging - Børn | Kr. 500.000<br>Kr. 100.000<br>Kr. 60.000 |
| ☐ | **Pakki 2** | Kr. 372,03 pr. mðn. | Lívstrygging<br>Bráðsjúkutrygging<br>Bráðsjúkutrygging - Børn | Kr. 750.000<br>Kr. 150.000<br>Kr. 90.000 |
| ☐ | **Pakki 3** | Kr. 492,55 pr. mðn. | Lívstrygging<br>Bráðsjúkutrygging<br>Bráðsjúkutrygging - Børn | Kr. 1.000.000<br>Kr. 200.000<br>Kr. 120.000 |

## Upplýsingar um tryggjaða

| | | |
|---|---|---|
| Navn | | P-tal |
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |
| Teldupostadressa | | Telefon |
| Starv | Tryggingin skal setast í gildi (dagfesting) | |

## Tilskilan

Mínar **Lívstryggingar** skulu útgjaldast til (set BERT ein kross):

☐ Næsta avvarðandi

☐ Búgvið

☐ Børnini í líka stórum lutum

☐ Sum tilskilað: Navn ______________________ P-tal ____________

## Tilmelding til GjaldSkipanina

☐ Gjaldið skal tilmeldast vanliga gjaldsavtalu, um møguligt. Eg góðtaki, at íbindingaravtala til GjaldSkipanina verður stovnað, um hon ikki finst frammanundan.

Skrásetingarnr.: ________ Kontonr.: ______________________

_______________ Dagfesting

_______________ Undirskrift tryggingartakarans

Tryggingarnar verða teknaðar sambært reglunum í Almennu tryggingartreytunum og tryggingartreytunum fyri Bráðsjúku hjá Betri Pensjón.

| | | |
|---|---|---|
| **Betri Pensjón fyllir út**<br>Heilsuváttan góðkend: Ja ☐ Nei ☐<br>Dagfesting ______________ | Kundanr.: | Tryggingarnr.: |
| | Kontonr.: | Undirskrift |

betri

**Betri Pensjón P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo

# Vel eina av trimum pakkaloysnum

**Ert tú millum 51 og 66 ár, ber til at tekna eina bólkatrygging hjá okkum. Bólkatryggingin hjá Betri Pensjón fevnir um Lívstrygging og Bráðsjúkutrygging. Tríggir pakkar eru at velja ímillum.**

**Vel eina av pakkaloysnunum niðanfyri:**

### Pakki 1




Lívstrygging Kr. 500.000,-
Bráðsjúkutrygging Kr. 100.000,-
Bráðsjúkutr. - Børn Kr. 60.000,-

### Pakki 2




Lívstrygging Kr. 750.000,-
Bráðsjúkutrygging Kr. 150.000,-
Bráðsjúkutr. - Børn Kr. 90.000,-

### Pakki 3




Lívstrygging Kr. 1.000.000,-
Bráðsjúkutrygging Kr. 200.000,-
Bráðsjúkutr. - Børn Kr. 120.000,-

## Lívstrygging

Lívstrygging tryggjar tína familju, um tú doyrt. Hon er galdandi tey árini, tú vanliga ert virkin á arbeiðsmarknaðinum. Lívstrygging kann koma teimum avvarðandi væl við, um illa veit við. Hon tekur við, um tú doyrt í tryggingarskeiðnum. Tá fáa tey, ið eftir sita, eina upphædd útgoldna.

## Bráðsjúkutrygging

Bráðsjúkutrygging tryggjar tær skjótt og munandi útgjald, um tú fært álvarsliga sjúku, og tú og næstringar tínir noyðast at sleppa øllum skyldum og savna tykkum um sjúku og viðgerð.

Vit leggja okkum ikki út í, hvat tú brúkar útgjaldið til. Til dømis kanst tú brúka peningin til serlæknaviðgerð, hjálpitól ella bara at gjalda fyri frítíð og ferðing til tess at koma fyri teg aftur.

## Bráðsjúkutrygging til børn

Hevur tú børn, sum verða rakt av álvarsligari sjúku, so eru tey eisini umfatað av tíni Bráðsjúkutrygging.
Útgjaldið er 60% av tryggingarupphæddini hjá tær. Umfatað eru børn í aldrinum upp til 18 ár.

## Hvør arvar teg?

Er eingin skrivlig avtala gjørd við Betri Pensjón um annað, verður tryggingarupphæddin í sambandi við deyða goldin út til næsta avvarðandi. Næsti avvarðandi er hjúnafelagin. Er eingin hjúnafelagi, verður goldið út til lívsarvingar. Eru eingir lívsarvingar, verður útgoldið sambært arvalógini. Tá ið tú tilskilar onkran persón, gert tú av, hvør skal hava tína tryggingarupphædd, um tú doyrt.

## Skattur

Bólkatryggingin verður teknað uttan frádrátt í inntøkuni. Tryggingarveitingar verða útgoldnar skattafrítt, tó kann møguligt arvaavgjald verða álagt.

## Treytir

Treytin fyri at tekna bólkatrygging hjá Betri Pensjón er, at tú fyllir út heilsuváttan, og eru tryggingar treytaðar av, at heilsustøðan er nøktandi. Tryggingarnar eru galdandi fram til 67 ára aldur.

**Betri Pensjón P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo

# Heilsuváttan

| Navn | | P-tal |
|---|---|---|
| Bústaður | Postnummar | Bygd/Býur |
| Teldupostur | | Tel |

**Hevur tú nakra álvarsama ella viðgerðarkrevjandi sjúku?** Ja ☐ Nei ☐ Um ja, hvørja?

**Hevur tú seinastu 4 árini verið óarbeiðsfør/ur ella sjúkrameldað/ur meira enn ein mánað grundað á eina ella fleiri sjúkur?** (her verður ikki hugsað um krím, beinkrím ella líknandi) Ja ☐ Nei ☐ Um ja, hví?

**Hevur tú seinastu 4 árini fingið viðgerð ella er kannað/ur á sjúkrahúsi, hjá serlækna ella øðrum viðgerðarstovni?** (her verður ikki hugsað um regluliga læknakanning og vanligar føðingar) Ja ☐ Nei ☐ Um ja, hví?

**Hevur tú seinastu 4 árini verið viðgjørd/ur við heilivági í einum tíðarskeiði upp á meira enn ein mánað?** Ja ☐ Nei ☐ Um ja, hví?

**Hevur tú søkt um, fingið almannahjálp ella endurgjald orsaka av heilsuni?** Ja ☐ Nei ☐ Um ja, hví?

**Hevur tú vart starv ella skift starv orsaka av heilsuni?** Ja ☐ Nei ☐ Um ja, hví?

**Ert tú fullkomuliga arbeiðsfør/ur?** Ja ☐ Nei ☐ Um nei, hví?

**Hvussu høg/ur ert tú, og hvussu nógv vigar tú?** Hædd: ______ cm Vekt: ______ kg

**Hevur tú roykt í einum samanhangandi tíðarskeiði á minst 12 mánaðir seinastu 2 árini?** Ja ☐ Nei ☐ Daglig nýtsla og slag?

**Undirskrift**

Undirritaði veit, at tryggingin kann verða lækkað ella sett úr gildi, um svarini ikki eru til fulnar sonn, ella tagt er við onkrum. Undirritaði loyvir Betri Pensjón at leita sær upplýsing hjá teimum, sum hava ella kunnu fáa kunnleika um heilsuviðurskifti, hjá undirritaða. Betri Pensjón kann gera hesi kunnug við tað, sum er upplýst fyri Betri Pensjón.

Dagfesting ______ Tryggjaði ______


betri

**Betri Pensjón P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo